FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

J.Nr.: 19/00427-2

Svar uppá spurning nr. 18/2019 eftir § 52a í tingskipanini

Spurningur frá Heðin Mortensen, løgtingsmanni, settur Jørgen Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um innkomuvegin til Havnar.

Spurningurin er soljóðandi:

1. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrismaðurin viðvíkjandi innkomuvegnum til Havnar?
2. Eru tingingar millum land og kommunu um málið, og um so er, hvør er tíðarkarmurin?
3. Ætlar landsstýrismaðurin at seta pening av til innkomuvegin á komandi fíggjarlóg?
4. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, nær innkomuvegurin til Havnar væntandi verður liðugur?

Svar:
Hendan samgongan byrjar meir ella minni av nýggjum við hesum máli. Hóast innkomuvegurin til Havnar hevur verið ovarlaga á breddanum í fleiri ár, so megnaði undanfarna samgonga, hvørki at hava nøktandi játtan til verkætlanina ella at fáa eina verklagslóg samtykta. Játtanin til verkætlanina er bert 1 mió.kr. í 2019, meðan 5 mió.kr. eru fluttar frá undanfarnum árum. Játtanin er brúkt til at byrja at gera eitt vegastrekki á innkomuvegnum við Skarðshjalla, við at leggja tunnilsgrót í vegin.

Sitandi landsstýrið hevur ikki havt tingingar við Tórshavnar kommunu um innkomuvegin. Landsstýrið arbeiðir við at raðfesta íløgur innanfyri langtíðar løgukarmin og verður landsins partur av kostnaðinum í sambandi við innkomuvegin partur av hesi raðfesting. Arbeiðið við hesum er ikki komið á mál, herundir heldur ikki, hvussu nógv verður sett av til hvørja verkætlan á komandi fíggjarlóg. Ætlanir hava verið um at gera innkomuvegin lidnan í stigum, so hvørt ferðslutrýstið ger tað neyðugt, og tí ber illa til at siga nær innkomuvegurin í síni heild verður liðugur.

Tinganes, 23. november 2019

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum